## DAGSINS MEINING

### Ósømilig tilgongd – gott úrslit!

Eftir mikið rok og samáðingar á fleiri mótum, nátt og dag, fær høvuðsstaðurin eina nýggja býráðsleiðslu. Nógv spurnartekin kunnu setast við samráðingar, ella avtalur, sum ikki vórðu hildnar, og mong munnu halda, at tilgongdin at skipa samgongu átti at verið sømiligari.

Tey flestu munnu halda, at tað er gott fyri lokala fólkaræðið, at leiðslan skiftir við millumbilum, í hesum føri millum ymiskar politiskar flokkar. Søgan vísir okkum, at tá tey somu sita við valdið í ov langa tíð, seta persónlig ella partapolitisk áhugamál ov stóran dám á rikna politikkin.

Um hetta fyribrigdi hevur gjørt seg galdandi í Tórshavnar kommunu munnu tey flestu hava eina meining um. Fleiri mál hava víst, at limir í fráfarandi meiriluta hava fingið góðar sømdir í ávísum førum. Eisini hava byggimál vist, at leiðsla og fyrsiting hava ikki verið nóg dugnandi, tá atlit ikki eru tikin til byggisamtyktir. Í øðrum førum hevur leiðslan verið skjót at broyta byggisamtyktir fyri at ganga ávísum ynskjum á møti.

Til býráðsins rós sigast, at Tórshavnar býráð hevur nátt fleiri setningum. Tørvurin á barnaansing er nøktaður. Munandi ábøtur eru gjørdar á vegakervið. Fleiri rundkoyringar fáa ferðsluna at liða seg betur, hóast tað framvegis verður hugsað ov lítið um tey sum ganga, súkla ella koyra barnavogn. Vágirnar eru reinari, hóast langt er enn á mál á kloakkøkinum. Á eldraøkinum er Tjarnargarður eitt stórt framstig. Men bæði ellis- og røktarheimspláss og íbúðir til eldri vanta í stórum tali.

Men nú fær so nýggi meirilutin høvi at royna seg, tí partar av honum hava støðugt víst á skeivleikar og aðrar loysnir. So er bara at vóna, at hesi fáa gott áralag við komandi borgarstjóran, Heðin Mortensen, sum var varaborgarstjóri farna valskeið, og sum gjørdist miðdepilin, tá samgona skuldi skipast.

Eftir tvístøðu í Sambandsflokkinum, fekk hann møguleikan at melda seg út ella verða koyrdur úr flokkinum. Hann valdi tað fyrra, og meldaði seg inn í Javnaðarflokkin, sum hann áður hevur verið limur í. Sjálvandi kann spurnartekin setast við trúvirði, men borgarstjórin fær høvi at vísa, um hann kann skapa tað neyðuga álitið, sum fjøldin av borgarunum eigur at hava á borgarstjóranum, tí hann er borgarstjóri fyri øll.

Sambandsflokkurin liggur sum hann hevur reitt. Viðferðin Heðin Mortensen hevur fingið er ikki serliga sømilig. Sum varamaður á tingi fleiri valskekið er hann sjáldan boðsendur. Fyri fýra árum síðani kundi Sambandsflokkurin skipa samgongu saman við Tjóðveldisflokkinum og Javnaðarflokkinum við Heðini sum borgarstjóra, men Sambandið valdi heldur Fólkaflokkin. Og taka vit síðsta løgtingsval, slapp hann næstan ikki framat í valstríðnum. So nú er bara at vóna, at Heðin og Javnaðarflokkin finna stevið til frama fyri býráðsarbeiðið!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Varðveitið gamla kirkjugarð!

**Nicolina Dahl**
*Klaksvík*

Bæði Sosialurin og Dimmalætting hava í vikuni borið tíðindi um, at nú skal gamli kirkjugarður niðri í Vági í Klaksvík 'latast upp', sum tikið verður til. Málið hevur verið fyri fyrr, men merkiliga stillisliga hevur verið gingið við hurðunum higartil, nú arbeiðið sambært teknisku deild býráðsins er klárt at bjóða út. Sosialurin skrivar, at "Vágstún skal snøggast", men tað snópisliga er, at Vágstún yvirhøvur ikki er við í hesi sokallaðu fríðkanarætlan.

Hóast eg stúri fyri, at hesar reglur ivaleyst verða skrivaðar til fánýtis, so fari eg kortini at koma við eini inniligari áheitan á býráðið um at hugsa seg um einaferð enn, tí hetta er onki minni enn halgibrot.

Gamli kirkjugarður er ikki nøkur park. Hetta er vígd jørð, har forfedrar okkara løgdu síni kæru í fedranna jørð, har tey skuldu hvíla í friði. Tað er ikki rætt at leggja hesar vígdu gravir út á berajól og undir vanligt fótatraðk. Tey, ið hvíla undir grønu torvu, eiga ikki at vera løgd undir flísatún. Uttan mun til hvussu langt síðan tað er, at tann seinasta grøvin var grivin, so hava tey deyðu krav uppá virðing. Tað er ikki lukkuligt at bróta gravarfriðin og væl ber til at fríðka uttan at fara so harðliga til verka.

Ætlanin er tekin um vantandi virðing fyri tí, sum farið er. Vit vóru sum børn lærd at virða alt, ið heilagt er. Vit lærdu at boyggja høvur undir bøn, at reisast fyri orðinum í kirkjuni og hava virðing fyri tí æviga. Vit lærdu at virða forfedrarnar og lata støvið hvíla í friði. Á kirkjugarði átti friður at valda.

Vit reypa okkum av, at vit í Føroyum framvegis byggja á kristna siðalæru og at her hjá okkum eru ikki allar virðismetingar farnar av lagi. Men kortini síggja vit, hvussu vit meira og meira leggja okkum eftir, hvussu tey gera aðrastaðni. Tann siðvenja og tann mentan, sum er okkara egna, hon verður kveistrað til viks, tí tað er lættari og meira spennandi at apa eftir øðrum.

Sambært fjølmiðlunum eru eisini kirkjuligir myndugleikar spurdir í hesum máli. Tað er skelkandi at vita, at sjálvt teir ikki duga at síggja, hvussu høpisleyst tað er at taka kirkjugarðin niður.

Fyri nøkrum árum síðan var nógv umtalað í Danmark, at ein gamal kirkjugarður skuldi javnast við jørðina og ein handil leggjast omaná. Tað ljóðaði fullkomuliga burturvið, og ætlanin varð mær vitandi eisini steðgað umsíður. Men eru vit nakað betri? Tá virðingin er farin at minka, hvar enda vit so? Nær kunnu vit vænta, at kirkjugarðurin á Ziskatrøð stendur fyri tørni? Meg minnist gamla skilagóða konu, sum nú hvílir undir grønu torvu. Hon segði einaferð, at soleiðis, sum nú er vorðið, so verður tað ikki leingi, til tey sparka bólt omaná gravunum.

Sum vanligur borgari í Klaksvík heiti eg inniliga á býráðið: Varðveitið gamla kirkjugarð sum tað hann er: ein gamal vígdur kirkjugarður.

# Vilja hava býráðið saman

Til
**Jan Christiansen**
**borgarstjóri**
**Á Vaglinum**
**100 Tórshavn**

Við hesum heita vit sjey limir í nývalda býráðnum, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jacobsen og Elin Lindenskov, á teg sum fyrst valda býráðslim um sum skjótast at kalla býráðið saman at skipa seg.

**Vegna býráðslimirnar**
**Heðin Mortensen (sign)**



*Nýggja samgongan vil hava Jan Christiansen, fráfarandi borgarstjóra at kalla nýggja býráðið saman sum skjótast at skipa seg. Tað er fyrst valdi býráðslimur, ið skal kalla býráðið saman - og tað skal bara gerast fyri 1. januar 2005*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Breitt samstarv í Sunda Kommunu

**Hóskvøldið hittust nývaldu bygdaráðslimirnir í nýggju Sunda Kommunu til ein fund, sum skuldi vera ein óformiligur kaffifundur. Men longu innan tríggir tímar vóru farnir, hevði bygdaráðið skipað seg í eitt breitt samstarv, har allir tríggir listarnir eru umboðaðir**



*Søgulig løta, tá bygdaráðið í nýggju Sunda Kommunu hittist á fyrsta sinni. Fundurin skuldi vera ein óformligur kaffifundur, men limirnir gjørdu skjótt av og skipaðu seg við Heðini Zachariasen sum borgarstjóra og Árna Dam sum varaborgarstjóra*

SUNDA KOMMUNA
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tað var ein søgulig løta, tá limirnir, sum eru valdir at stýra nýggju Sunda Kommunu hóskvøldið hittust á kommunuskrivstovuni í húsinum á Oyrarbakka, sum felagskommunurnar hava keypt til kommunuhús.

Fundurin skuldi vera ein óformiligur kaffifundur, sum fyrstvaldi, Heðin Zachariasen, hevði kallað inn til.

Men longu innan tríggir tímar vóru farnir, hevði nývalda bygdaráðið skipað seg við Heðini Zacharisen sum borgarstjóra og Árna Dam sum varaborgarstjóra.

Í samrøðu við Sosialin, beint eftir valið, søgdu teir fýra, Heðin Zachariasen, Árni Dam, Jógvan Mørkøre og Sofus D. Johannesen, sum sita, sum borgarstjórar í ávikavist, Hvalvík, Sunda Kommunu, Hósvík og við Gjógv, at teir ynsktu eitt breitt samstarv.

– Tað eru sera umráðandi, at hvør einasti borgari kennir, at hann er ein partur av nýggju kommununi, leggja øll tey valdu dent á. Tær seks kommunurnar, sum nú verða lagdar saman, hava frammanundan samstarvað í 20 ár, og tað samstarvið hevur verið gott og konstruktivt, vísir Árni Dam á.

Borgarstjórin er føddur formaður í fíggjarnevndini, og hinir limirnir eru: Árni Dam, næstformaður, Sofus D. Johannesen, Kim Durhuus og Jónleif Samuelsen.

Í teknisku nevnd sita, Jógvan Mørkøre, formaður, Trygvi K. Joensen, næstformaður og Kjartan S. Jensen.

Í Trivnaðarnevndini sita: Asbjørn Djurhuus, formaður, Gurið Samuelsen, næstformaður og Jana Mouritsen. Í nevndina hjá SEV eru valdir: Trygvi K. Joensen og Kim Durhuus Í IRF: Árni Dam

Í Kommunufelagið: Asbjørn Djurhuus . Í nevndina fyri Felagsskúlan: Sofus D. Johannesen, Gurið Samuelsen, Árni Dam, Kjartan S. Jensen, Kim Durhuus, Trygvi K. Joensen og Jana Mouritsen

Eysturoyar ellis- og røktarheim: Sofus D. Johannesen og Árni Dam.

# Mentanin alstóran týdning fyri samfelagið

**Nýggi stjórin í Norðurlandahúsinum ætlar at byggja á herðarnar á teimum undanfarnu stjórunum. Hann fer at leggja stóran dent á at fáa tiltøk út á bygdirnar eisini. Hann fer at somuleiðis at menna samskiftið og samstarv millum mentanarlívið og vinnulívið. Uppgávan verður so eisini at fáa norðurlenska mentan til Føroya og at fáa føroyska mentan út í heim. Spennandi uppgávur leiggja fyri framman**



*Niels Halm, nýggi stjórin í Norðurlandahúsinum*

*Mynd Jens K Vang.*

NÝGGJUR STJÓRI
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Nýggi stjórin í Norðurlandahúsinum, Niels Halm er sera fegin um nýggja starvið og tað stóra álit, sum er víst honum. Hann er í Føroyum í hesum døgum fyri at kunna seg um viðurskiftinini, áðrenn hann tekur við 1. februar. Hann hevur vitjað í Føroyum nakrar ferðir, seinast fyri 20 árum síðani. – Eg havi altíð havt stóran áhuga og tokka til samfeløgini í útnorði, her ikki minst Føroyar. Tá eg sá lýsingina helt eg tað kundi verið ótrúliga spennandi at søkja.

Niels Halm hevur drúgvar royndir á mentanarøkinum. (Sí faktagreinina.). Hann sær tað sum eina stóra og spennandi uppgávu bæði at kunna vísa fram føroyska mentan í útheiminum og at kunna vísa fram norðurlendska mentan bæði í Norðurlandahúsinum og úti kring landið.

Niels Halm leggur stóran dent á at fáa nøkur av tiltøkunum í Norðurlandahúsinum út um oyggjarnar eisini.

Sum heild koma hansara royndir sum ein praktiskur mentanarformidlari væl við. Hann hevur m.a. havt ábyrgdina av taka stórar verkætlanir í brúk so sum Stórabeltbrúgv og Oyrasundsbrúgv.

Hvat er so styrkin hjá nýggja stjóranum og er tað ein serstøk listagrein, sum hann hellur meira til enn aðrar?: –Eg havi tikið mær av nógvum praktiskum viðurskiftum, eitt nú staðið fyri bókmentafestivalum og verið managari fyri mangar kendar danskar listarmenn. Eg royni at virka á mongum økjum, so man kann siga, at eg eri ein glaður amatørur á øllum økjum.

Tá hann skal lýsa seg sjálvan, so heldur Niels Halm, at hann metir seg duga væl at skipa "netverk" og fáa fólk at arbeiða saman og at gjøgnumføra verkætlanir.

*Hvussu við teimum ungu?*

– Tey hava so sanniliga eisini mín stóra áhuga. Sjálvur var eg við til at skipa fyri einum barnateaturfestivali í Sankta Pætursborg fyri nøkrum árum síðani. Eisini havi eg tikið mær av einum barnaprojekti í danska húsinum í París. So eg leggi stóran dent á at arbeiða við og fyri børn og ung.

Niels Halm sær nú fram til at hitta umboð fyri mentanarlívið í Føroyum og ikki minst eisini at kunna ferðast kring oyggjarnar og síggja, hvat fyriferst har. – Eg haldi tað er sera umráðandi, at Norðurlandahúsið verður ein partur av øllum mentanarumhvørvinum í Føroyum, har tað finst eitt gott samstarv millum ymsu mentarnarfeløgini og stovnarnar.

Niels Halm heldur fyri, at mentanin hevur sera stóran týdning fyri eitt samfelag. Eisini heldur hann, at vit eiga at raðfesta hægri samskiftið og samstarvið millum mentan og vinnulív.

Niels Halm er giftur og eigur ein 15 ára gamlan son. Tey bæði fara so at búgva í Keypmannhavn. Sonurin skal byrja á studentaskúla. Konan Jette fer at vitja so oftani til ber. Hon er konsolentur í LO, har hon arbeiðir við javnstøðu.

## FAKTA

Nýggi stjórin í Norðurlandahúsinum er dani og eitur Niels Halm. Nevndin fyri húsið hevur einmælt gjørt av at seta hann í starvið frá 1. februar. Tá avloysir hann Helgu Hjörvar, sum staðiliga og væl hevur røkt hetta starvið í fleiri ár.

Niels Halm er 52 ára gamal og hevur til í summar verið leiðari av "Internationalt Kultursekretariat" undir danska mentamálaráðnum. Uppgáva hansara har hevur verið at "nytænke og modernisere strategien for udvekslingen af dansk kunst og kultur med udlandet i samarbejde med det dengang nyoprettede Internationalt Kulturråd".

Niels Halm hevur annars verið virkin á nógvum mentanarøkjum og hevur sera drúgvar royndir í altjóða mentanarsamskifti og hevur sett í gongd fleiri stórar mentanarligar og listarligar verkætlanir og tiltøk. Hann hevur verið Booking- og eventstjóri í mentanarfelagsskapinum ARTE í Keypmannahavn.

Millum fjølbroytta virksemi hansara kann nevnast, at hann hevur verið managari fyri Sebastian, Poul Dissing, Benny Andersen og Wolf Biermann. Í 2002 hevði hann ábyrgdina av mentanarsendingini í sambandi við danska formansskapin í EU, og hann hevði ábyrgdina av altjóða framsýningini í sambandi við 100 ára dagin fyri arkitektin Arne Jacobsen.

Í virki sínum hevur Niels Halm eisini ment góðar royndir í samarbeiðinum millum mentanarlívið, vinnulívið og ferðavinnuna. Í sínum dagliga virki í Internationalt Kultursekretariat hevur hann havt eitt tætt og varandi samstarv við Nordisk Ministerråd og hevur verið limur av stýribólkinum í ráðnum fyri altjóða mentanarsamstarv.

Í tíðindaskrivi sigur nevndin fyri Norðurlandahúsið, at hon sær fram til eitt uppbyggjandi og gott samstarv við Niels Halm um tey mongu fjølbroyttu og listarligu mentanartiltøkini í húsinum.